# Almennar reglur fyri Heildarkontu

**Reglurnar eru galdandi fyri Heildarkontur, sum bankin umsitur.**

**1. Hvør kann stovna eina heildarkontu?**Lønarkundar, sum eru yvir 18 ár, kunnu stovna Heildarkontu.

**2. Hvat er ein heildarkonta?**
Ein konta har allar fastar/afturvendandi útreiðslur verða j avnaðar yvir árið, og føst flyting skal stovnast á Heildarkontuna

**3. Hvussu verður goldið?**
Gjaldsloyvi, gjaldtænasta ella føst flyting skulu stovnast.

**4. Kvittanir fyri flytingar**
Í Netbankanum ber til at heinta kontuavrit, har allar bókingar eru at síggja. Møguligt er at fáa kontuavrit sent. Eisini ber til at kanna kontuna umvegis Telefontænastuna ella Boðtænastuna. Skal serlig kvittan nýtast, kann hon bílleggjast í einari av okkara deildum. Sí ómaksgjøld á www.betri.fo

**5. Fulnaður**
Heildarkonta kann ikki fara í størri trot enn loyvt er sambært heildarkontuútrokning. Hendir hetta, skal vera sagt frá innan 14 dagar.

**6. Kostnaður**
Árligt gjald er á Heildarkontu, og gjald fyri útrokningar v.m. í ótíð, sí ómaksgjøld á www.betri.fo

**7. Uppsøgn**
Verða reglurnar fyri Heildarkontu ikki hildnar, tilskilar Betri sær rætt til at siga avtaluna upp. Kundin kann altíð siga avtaluna upp.

**8. Broytingar**
Boytingar í oljugjaldi, barnaansing v.m. kunnu føra til neyðugar broytingar í gjaldsupphæddini. Um broytingar av hesum slagi verða, átekur kundin sær at geva Betri boð um hetta.

**9. Mishald**
Verður Heildarkontuavtalan mishildin frá kundans síðu, fellur hon burtur av sær sjálvum, og er Betri tískil leysur frá teimum tænastuskyldum, ið her eru fastlagdar.

**10. Renta**
Heildarkontan verður rentað sum ein vanligt konta uttan uppsøgn, sí Rentutalvu á www.betri.fo Er kontan í troti ella kredittur er knýttur at kontuni, verður ein broytilig debitrenta roknað. Debitrentan verður skuldskrivað fýra ferðir um árið.

betri

**Betri Banki P/F**
Postboks 34
Yviri við Strond 2
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 348 000
banki@betri.fo
www.betri.fo